NORÐOYA SPARIKASSI

# HÁLVÁRSFRÁSØGN 1. HÁLVÁR 2019

100

SÍÐAN 1919

NORÐOYA SPARIKASSI

Ósávegur 1
Postboks 149
FO-710 Klaksvík
Tel. 475000
Fax 476000
ns@ns.fo
www.ns.fo

Deildin í Fuglafirði:
Í Støð 7
FO-530 Fuglafjørður
Tel. 475000

Deildin í Tórshavn:
Hoyvíksvegur 67
FO-100 Tórshavn
Tel. 475000
Fax 476015

# Innihaldsyvirlit

| | | |
|---|---|---|
| LEIÐSLUÁTEKNING | s. | 3 |
| HÁLVÁRSFRÁGREIÐING 2019 | s. | 4 |
| RAKSTRARROKNSKAPUR 1. HÁLVÁR 2019 | s. | 7 |
| FÍGGJARJAVNI 30. JUNI 2019 | s. | 8 |
| ÚTGREINING AV EGINPENINGI | s. | 9 |
| SOLVENSUPPGERÐ | s. | 10 |
| LYKLA- OG HØVUÐSTØL | s. | 11 |
| NOTUR | s. | 12 |

# Leiðsluátekning

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og góðtikið hálvársfrásøgnina fyri 1. hálvár 2019 fyri Norðoya Sparikassa. Hálvársfrásøgnin er greidd í samsvari við lóg um fíggjarligt virksemi, herundir roknskaparkunngerð frá Fíggjareftirlitinum um fíggjarligar frásagnir hjá kredittstovnum v.m.

Tað er okkara fatan, at hálvársfrásøgnin gevur eina rættvísa mynd av sparikassans ognum, skyldum og fíggjarjavna pr. 30. juni og úrslitinum fyri 1. hálvár 2019.

Hálvársfrásøgnin er ikki grannskoðað.

Klaksvík, hin 27. august 2019.

Stjórn

Marner Mortensen

Nevnd

| | | |
|---|---|---|
| John P. Danielsen<br>*formaður* | Jóannes Hansen<br>*næstformaður* | Karl Heri Joensen |
| Frimodt Rasmussen | Súsanna Olsen | Eyðun Kjølbro |
| Guðrið Lava Olsen | Tummas Martin Sólsker | Janus Joensen |

# Hálvársfrágreiðing 2019

## Fyrra hálvár í stuttum

- Avlop eftir skatt 7,9 mió. kr.
- Renting av eginognini eftir skatt 3,3 %
- Útlánini øktust 3,0 %
- Innlánini øktust 2,1 %
- Ábyrgdarfæið øktist 8,2 %
- Útlánsprosentið 84 %
- Gjaldførisyvirdekningurin (§ 152) 161 %
- Kjarnukapitalprosentið 18,5 %
- Solvensurin 20,4 %
- Solvenstørvurin 10,7 %

## Virksemi

Sparikassans virksemi er at veita fíggjarligar tænastur til privat og vinnurekandi viðskiftafólk og almennar stovnar um alt landið. Sparikassin ynskir at veita viðskiftafólkum sínum eitt fjølbroytt úrval av fíggjarligum tænastum og eisini eina holla og professionella ráðgeving.

## Sparikassin 100 ár

Tann 24. septembur í ár verður sparikassin 100 ár, og verður hetta hátíðarhildið alt árið við ymsum tiltøkum.

Startskotið til 100-ára haldið var krúnprinsavitjanin í august mánað í fjør, tá Fríðrikur, krúnprinsur, og Mary, krúnprinsessa, løgdu leiðina inn í Norðoya Sparikassa, har tey hoyrdu um 100-ára søgu og virksemi sparikassans.

Sparikassin hevur síðani krúnprinsavitjanina hildið fram við 100-ára hátíðarhaldinum. Nevnast kunnu tiltøk sum Torradagarnir í Klaksvík, har sparikassin var partur av ymsum tiltøkum, stóra morgunmatarborðið í Mentanarhúsinum í Fuglafirði og tiltakið Ein dagur á grynnuni í Havnini, har sparikassin borðreiddi við fiskasuppu í Perluni. Á mentanarliga økinum hevur sparikassin latið bringumynd av Jógvan Waagstein, sum varð avdúkað í býarlundini í Klaksvík, og veitt stuðul til standmynd av Elinborg Lützen, sum væntandi verður avdúkað í Klaksvík á 100-ára degnum hjá sparikassanum. Harumframt verður eitt 100-ára minnisrit útgivið.

Leygardagin 28. septembur 2019 verður serligt tiltak fyri ábyrgdarum, viðskiftafólki og almenninginum í ítróttarhøllunum í Klaksvík.

## Gongdin fyrra hálvár 2019

Úrslitið eftir skatt var eitt avlop upp á 7,9 mió. kr. samanborið við 5,0 mió. kr. sama tíðarskeið í fjør, sum er ein vøkstur upp á 2,9 mió. kr. Vøksturin stavar í høvuðsheitum frá hægri rentu- og kostnaðarinntøkum, avlopi frá virðisjavna og afturføring av niðurskrivingum. Eginognin rentaði við 3,3 % fyrra hálvár og er nú 247 mió. kr.

Verður sæð burtur frá virðisjavnan og niðurskrivingum av útlánum, hevði sparikassin eitt avlop av vanligum rakstri fyrra hálvár upp á 5,1 mió. kr. móti 5,8 mió. kr. sama tíðarskeið árið fyri. Hetta er ein minking í vanliga rakstrinum upp á 0,7 mió. kr., ið serliga stavar frá hægri útreiðslum í sambandi við 100-ára hátíðarhaldið.

Sparikassin hevur sum mál at vera kappingarførur, og hetta sæst eisini aftur í roknskapinum, har út- og innlán øktust ávikavist 3,0 % og 2,1 %. Rentustøðið er framvegis á sera lágum støði og leggur trýst á rentuinntøkurnar, men við tillaging av rentuútreiðslum eru netto rentuinntøkurnar á sama støði sum fyri einum ári síðani.

Á umboðsráðsfundinum í apríl í ár samtykti umboðsráðið at renta ábyrgdarpeningin fyri 2018 við 5 prosentum. Hetta hevur verið galdandi øll árini síðani 2012, tá lógin varð broytt. Sparikassans politikkur fyri 2019 er, at árliga rentan á ábyrgdarpeningi framvegis verður 5 prosent. Sparikassin merkir stóran áhuga fyri at tekna ábyrgdarpening, og fyrra hálvár er ábyrgdarpeningurin hækkaður við 1,7 mió. kr., ið svarar til eina øking á 8,2 %.

Gongdin fyrra hálvár hevur sum heild verið í samsvari við metingar sparikassans og samanumtikið er sparikassin nøgdur við gongdina.

## ROKNSKAPARFRÁGREIÐING

### Netto rentu- og kostnaðarinntøkur

Netto rentu- og kostnaðarinntøkurnar vóru 36,4 mió. kr. í mun til 35,4 mió. kr. sama tíðarskeið í fjør, sum er ein øking upp á 1,0 mió. kr. Kappingarstøðan og lága rentustøðið leggja trýst á rentuinntøkurnar, men vegna tillaging av rentuútreiðslum eru netto rentuinntøkurnar á sama støði sum árið fyri. Kostnaðar- og provisjónsinntøkur eru hækkaðar við 1,0 mió. kr. í mun til fyrra hálvár 2018.

### Virðisjavnan

Virðisjavnin vísir eitt avlop upp á 1,2 mió. kr. sammett við hall á 0,3 mió. kr. sama tíðarskeið undanfarna ár. Tað er ein hækking upp á 1,5 mió. kr. Virðisjavnin av lánsbrøvum vísti eitt avlop upp á 0,7 mió. kr., meðan virðisjavnin av óskrásettum partabrøvum var eitt avlop upp á 0,3 mió. kr., og virðisjavnin av gjaldoyra var eitt avlop á 0,1 mió. kr. Sparikassin eigur bert partabrøv í Elektron, SDC, DLR Kredit og BOKIS, ið eru feløg, sum sparikassin samstarvar við.

### Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting

Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting hækkaðu úr 26,7 mió. kr. upp í 30,3 mió. kr, ið er ein hækking upp á 3,6 mió. kr. Útreiðslur til lønir og sosialar veitingar hækkaðu við 0,4 mió. kr., meðan fyrisitingarútreiðslur hækkaðu við 3,2 mió. kr. Øktu fyrisitingarútreiðslurnar stava í høvuðsheitum frá øktum KT-útreiðslum og útreiðslum í sambandi við 100-ára hátíðarhaldið. Samlaða talið av ársverkum fyrra hálvár í ár var 44,3 sammett við 43,2 sama tíðarskeið í fjør.

### Aðrar rakstrarútreiðslur

Aðrar rakstrarútreiðslur stava í høvuðsheitum frá útgjaldi úr gávugrunninum og gjaldi til Garantiformuen og Afviklingsformuen, sum eru skipanir í sambandi við innskjótaratrygd og avtøku av fíggjarstovnum. Fyrra hálvár var útgjaldið úr gávugrunninum 234 t.kr.

### Niðurskrivingar

Góða búskapargongdin seinastu árini sæst aftur hjá kundum sparikassans. Fyrra hálvár í ár hevur sparikassin afturført niðurskrivingar upp á útlán og ábyrgdir við 1,6 mió. kr. Sama tíðarskeið í fjør vóru niðurskrivingarnar 0,5 mió. kr.

## FÍGGJARJAVNI

Fíggjarjavnin øktist við 46 mió. kr. 1. hálvár 2019, úr 2.587 mió. kr. og upp í 2.633 mió. kr. Hetta svarar til eina øking upp á 1,8 %. Høvuðsorsøkin til vøksturin í fíggjarjavnanum er økta virksemið hjá sparikassanum, har út- og innlán øktust ávikavist 3,0 % og 2,1 %. Innlánini øktust við 48 mió. kr., úr 2.302 mió. kr. við árslok 2018 og upp í 2.350 mió. kr. 1. hálvár 2019. Útlánini øktust við 57 mió. kr., úr 1.886 mió. kr. við árslok 2018 og upp í 1.943 mió. kr. 1. hálvár 2019.

### Gjaldføri

Gjaldførið hjá sparikassanum er gott. Fyrra hálvár í ár var yvirdekningurin í mun til § 152 lógarkravið 161 % samanborið við 168 % við ársenda í fjør. Eftirlitsdiamanturin hjá Fíggjareftirlitinum tekur útgangsstøði í framskriving av LCR í 3 mánaðir og ásetur markvirðið til minst 100 %. Sparikassin hevur uppgjørt hetta lyklatal til 249 %.

## Solvensur og solvenstørvur

Solvensurin hjá sparikassanum er góður. Fyrra hálvár í ár var solvensurin 20,4 % í mun til 19,3 % somu tíð í fjør. Kapital-krøvini verða alsamt herd komandi árini, og sparikassin leggur stóran dent á at bjálva seg enn betur til komandi krøvini.

Solvenstørvurin var uppgjørdur til 10,7 % pr. 1. hálvár 2019 í mun til 10,3 % somu tíð í fjør.

## Eftirlitsdiamanturin

Fíggjareftirlitið setti í 2012 í gildi ein sokallaðan eftirlitsdiamant. Har verða nevnd fimm ávaringartekin, sum kunnu geva ábendingar um, at ein peningastovnur hevur ov høgan váða. Niðanfyri er stutt frágreiðing um, hvussu váði sparikassans er í mun til hesi ávaringartekin.

Samanumtikið er sparikassin væl innanfyri hesi fimm ávaringartekin:

- **Stórir kundar** (20 teir størstu kundarnir tilsamans skulu vera minni enn 175 % av veruliga kjarnukapitalinum): 20 teir størstu kundarnir tilsamans pr. 30. juni 2019 eru uppgjørdir til 128,0 % av veruliga kjarnukapitalinum.
- **Útlánsvøkstur** (skal vera minni enn 20 % um árið): Sparikassin hevði fyrra hálvár 2019 ein útlánsvøkstur upp á 3,0 %.
- **Útlán og ábyrgdir til fastognir** (skulu vera minni enn 25 % av útlánum og ábyrgdum tilsamans): Pr. 30. juni 2019 vóru útlán og ábyrgdir sparikassans til fastognir 8,1 % av samlaðu útlánunum og ábyrgdunum.
- **Fíggingarlutfall** (útlán/arbeiðandi kapitalur minus lánsbrøv við restáramáli undir 1 ár, skal vera minni enn 1): Sparikassin hevur uppgjørt fíggingarlutfallið til 0,7 pr. 30. juni 2019.
- **Lyklatal fyri gjaldføri** (skal vera omanfyri 100 %): Sparikassin hevur pr. 30. juni 2019 uppgjørt lyklatalið til 249,3 %.

## Váðar og váðastýring

Ongar broytingar eru í váða og váðastýring sparikassans. Víst verður til frágreiðingina í ársfrásøgnini fyri 2018.

## Hendingar eftir roknskapartíðarskeiðið

Eftir at roknskapartíðarskeiðið endaði 30. juni 2019 hava ongar hendingar verið, sum ávirka fíggjarligu gongd sparikassans.

## Óvissur í sambandi við virðisáseting

Tær mest týðandi óvissurnar í sambandi við virðisáseting eru knýttar at virðisáseting av ognum og niðurskrivingum av útlánum og áogn. Leiðslan metir, at óvissurnar eru á einum støði, sum eru nøktandi í mun til hálvársfrásøgnina.

## Nýttur roknskaparháttur

Sparikassin hevur ongar broytingar gjørt í nýttum roknskaparhátti 1. hálvár 2019. Víst verður til ársfrásøgnina fyri 2018.

## Meting fyri 2019

Árið 2019 er serstakt, tí 24. september eru 100 ár liðin síðani sparikassin varð stovnaður. Hetta verður hátíðarhildið alt árið við ymsum tiltøkum og sæst aftur í roknskapinum fyri 2019.

Fyrra hálvár 2019 var avlopið áðrenn skatt 7,9 mió. kr. Inntøkur fyri seinna hálvár verða mettar at verða á sama støði sum fyrra hálvár, meðan útreiðslur til 100-ára hátíðarhaldið og KT framhaldandi hava ávirkan á útreiðslustøðið seinna hálvár. Harumframt kann roknast við lægri virðisjavna seinna hálvár, eins og óvissa er knýtt at niðurskrivingum upp á útlán og ábyrgdir.

Í ársfrásøgnini fyri 2018 varð mett, at úrslitið áðrenn skatt fyri alt árið 2019 fór at verða millum 8-12 mió. kr. Sparikassin er framvegis av tí fatan, at úrslitið áðrenn skatt fyri 2019 verður millum 8-12 mió. kr.

# Rakstrarroknskapur 1. hálvár 2019

| Nota | | 1H 2019<br>1.000 DKK | 1H 2018<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | Rentuinntøkur | 32.453 | 33.094 |
| 2 | Rentuútreiðslur | 1.477 | 2.203 |
| | **Netto rentuinntøkur** | **30.976** | **30.891** |
| | Vinningsbýti av partabrøvum o.ø. | 0 | 0 |
| 3 | Kostnaðar- og provisiónsinntøkur | 5.810 | 4.902 |
| | Útreiðslur til kostnað og provisión | 343 | 438 |
| | **Netto rentu- og kostnaðarinntøkur** | **36.443** | **35.355** |
| 4 | Virðisjavnan av virðisbrøvum, gjaldoyra o.ø. | 1.197 | -255 |
| | Aðrar rakstrarinntøkur | 15 | 634 |
| 5 | Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting | 30.332 | 26.690 |
| | Avskrivingar av ítøkiligum ognum | 720 | 3.395 |
| | Aðrar rakstrarútreiðslur | 276 | 84 |
| 6 | Av- og niðurskrivingar upp á skuldarar, netto | -1.610 | 539 |
| | **Úrslit áðrenn skatt** | **7.937** | **5.026** |
| | Skattur | 0 | 0 |
| | **Hálvársúrslit** | **7.937** | **5.026** |

# Fíggjarjavni 30. juni 2019

| Nota | | 1H 2019<br>1.000 DKK | 1H 2018<br>1.000 DKK | 2018<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|---|
| | **Ogn** | | | |
| | Kassapeningur og innistandandi uttan uppsøgn í tjóðbankum | 105.759 | 116.392 | 107.062 |
| | Ogn hjá peningastovnum o.ø. | 25.384 | 38.967 | 48.002 |
| | Útlán til amortiserað kostvirði | 1.943.065 | 1.875.321 | 1.886.287 |
| 7 | Lánsbrøv til dagsvirði | 506.495 | 451.487 | 490.085 |
| | Partabrøv o.a. | 12.931 | 12.344 | 12.600 |
| | Fastognir tilsamans | 12.114 | 19.683 | 12.234 |
| | Íløguognir | 0 | 7.065 | 0 |
| | Fastognir til egna nýtslu | 12.114 | 12.618 | 12.234 |
| | Aðrar materiellar ognir | 6.528 | 7.657 | 7.064 |
| | Útsett skattaáogn | 8.100 | 7.020 | 8.100 |
| | Yvirtiknar ognir | 8.037 | 8.733 | 8.337 |
| | Aðrar ognir | 5.022 | 6.067 | 7.552 |
| | **Ogn tilsamans** | **2.633.436** | **2.543.671** | **2.587.323** |
| | | | | |
| | **Skuld og eginpeningur** | | | |
| | **Skuld** | | | |
| | Skuld til peningastovnar og tjóðbankar | 20 | 21 | 372 |
| | Innlán | 2.350.170 | 2.271.993 | 2.302.496 |
| | Onnur skuld | 8.677 | 15.581 | 18.485 |
| | Tíðaravmarkingar | 362 | 302 | 365 |
| | **Skuld tilsamans** | **2.359.229** | **2.287.897** | **2.321.718** |
| | | | | |
| | **Avsetingar** | | | |
| | Avsetingar til eftirløn o.a. | 1.878 | 1.935 | 1.878 |
| | Avsetingar til tap upp á ábyrgdir | 0 | 17 | 3 |
| | Aðrar avsetingar | 103 | 85 | 133 |
| | **Avsetingar tilsamans** | **1.981** | **2.037** | **2.014** |
| | | | | |
| | **Eftirstillað kapitalinnskot** | **25.500** | **25.500** | **25.500** |
| | | | | |
| | **Eginpeningur** | | | |
| | Ábyrgdarpeningur | 22.501 | 20.135 | 20.802 |
| | Flutt frá undanfarnum árum | 215.885 | 206.177 | 203.075 |
| | Broyting í roknskaparhátti (IFRS 9) | 0 | -3.523 | 0 |
| | Flutt frá ársúrsliti | 7.937 | 5.026 | 12.810 |
| | Tilmælt renta av ábyrgdarpeningi | 0 | 0 | 1.004 |
| | Regulering av rentu av ábyrgdarpeningi | 2 | 22 | 0 |
| | Gávugrunnur | 400 | 400 | 400 |
| | **Eginpeningur tilsamans** | **246.726** | **228.237** | **238.091** |
| | | | | |
| | **Skuld og eginpeningur tilsamans** | **2.633.436** | **2.543.671** | **2.587.323** |

8 Aðrar skyldur

# Útgreining av eginpeningi

| | 1H 2019<br>1.000 DKK | 1H 2018<br>1.000 DKK | 2018<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| **Kapitalflytingar** | | | |
| Ábyrgdarpeningur við ársbyrjan | 20.802 | 19.806 | 19.806 |
| Tilgongd í árinum | 2.136 | 932 | 1.627 |
| Frágongd í árinum | -437 | -603 | -631 |
| **Ábyrgdarpeningur tilsamans** | **22.501** | **20.135** | **20.802** |
| | | | |
| Flutt avlop við ársbyrjan | 215.885 | 206.177 | 206.177 |
| Broyting í roknskaparhátti (IFRS 9) | 0 | -3.523 | -3.523 |
| Flutt úrslit | 7.937 | 5.026 | 14.214 |
| Flutt frá gávugrunni | -400 | -400 | -400 |
| Brúkt í árinum | 234 | 31 | 321 |
| Afturført frá gávugrunni | 166 | 369 | 79 |
| Tilmælt renta av ábyrgdarpeningi | 0 | 0 | -1.004 |
| Regulering renta av ábyrgdarpeningi undanfarið ár | 2 | 22 | 22 |
| **Flutt avlop tilsamans** | **223.824** | **207.702** | **215.885** |
| | | | |
| Tilmælt renta av ábyrgdarpeningi | 0 | 0 | 1.004 |
| | | | |
| **Gávugrunnur** | | | |
| Gávugrunnur við ársbyrjan | 400 | 400 | 400 |
| Brúkt í árinum | -234 | -31 | -321 |
| Afturført til flutt avlop | 166 | -369 | -79 |
| Tilmælt til gávugrunn í árinum | 400 | 400 | 400 |
| **Gávugrunnur tilsamans** | **400** | **400** | **400** |
| | | | |
| **Eginpeningur tilsamans** | **246.726** | **228.237** | **238.091** |

# Solvensuppgerð

| | 1H 2019<br>1.000 DKK | 1H 2018<br>1.000 DKK | 2018<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| Eginpeningur | 246.726 | 228.237 | 238.091 |
| Hálvársúrslit | -7.937 | -5.026 | 0 |
| Tilmælt renta av ábyrgdarpeningi | 0 | 0 | -1.004 |
| Varislig meting av dagsvirði | -528 | -480 | -512 |
| Aktiverað skattaaktiv | -8.100 | -7.020 | -8.100 |
| Heimild at útgjalda ábyrgdarpening | -1.000 | -1.000 | -1.000 |
| **Kjarnukapitalur aftaná frádrøg tilsamans** | **229.161** | **214.711** | **227.475** |
| | | | |
| Eginpeningur | 246.726 | 228.237 | 238.091 |
| Hálvársúrslit | -7.937 | -5.026 | 0 |
| Tilmælt renta av ábyrgdarpeningi | 0 | 0 | -1.004 |
| Varislig meting av dagsvirði | -528 | -480 | -512 |
| Aktiverað skattaaktiv | -8.100 | -7.020 | -8.100 |
| Heimild at útgjalda ábyrgdarpening | -1.000 | -1.000 | -1.000 |
| Ábyrgdarlán | 22.971 | 25.500 | 25.500 |
| **Kapitalgrundarlag aftaná frádrøg tilsamans** | **252.131** | **240.211** | **252.975** |
| | | | |
| Vektað tøl tilsamans | 1.237.800 | 1.244.583 | 1.233.215 |
| Solvensprosent | 20,4 | 19,3 | 20,5 |
| Kjarnukapitalprosent | 18,5 | 17,3 | 18,4 |
| | | | |
| **Uppgerð av solvenstørvi eftir kredittavsetingarháttinum** | | | |
| Kredittváði | 12.847 | 14.456 | 12.392 |
| Marknaðarváði | 8.453 | 3.017 | 10.065 |
| Operationellur váði | 6.189 | 6.223 | 6.166 |
| Annar váði | 5.394 | 4.826 | 4.815 |
| Lógarkrøv | 99.024 | 99.567 | 98.657 |
| **Solvenstørvur tilsamans** | **131.907** | **128.088** | **132.096** |
| | | | |
| Solvenstørvur (%) | 10,7 | 10,3 | 10,7 |

# Lykla- og høvuðstøl

| Lyklatøl | 1H 2019 | 1H 2018 | 1H 2017 | 1H 2016 | 1H 2015 |
|---|---|---|---|---|---|
| Solvensprosent | 20,4 | 19,3 | 18,3 | 18,1 | 18,1 |
| Kjarnukapitalprosent | 18,5 | 17,3 | 16,2 | 16,0 | 15,9 |
| Hálvársrenting av eginpeningi áðrenn skatt | 3,3 | 2,2 | 3,8 | 4,8 | 3,4 |
| Hálvársrenting av eginpeningi aftaná skatt | 3,3 | 2,2 | 3,8 | 4,8 | 3,4 |
| Úrslit fyri hvørja kostnaðarkrónu | 1,3 | 1,2 | 1,3 | 1,4 | 1,2 |
| Rentuváði | 1,7 | 1,9 | 2,8 | 3,3 | 2,9 |
| Gjaldoyrastøða | 0,9 | 0,6 | 0,4 | 0,3 | 0,3 |
| Gjaldoyraváði | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| Útlán og niðurskrivingar í mun til innlán | 84,3 | 84,3 | 80,9 | 82,4 | 85,0 |
| Gjaldføri yvir lógarinnar kravi | 160,6 | 156,8 | 188,0 | 169,0 | 154,1 |
| Stórir kundar tilsamans í mun til kjarnukapital | 128,0 | 142,5 | - | - | - |
| Akkumulerað niðurskrivingarprosent | 1,8 | 2,0 | 1,8 | 2,0 | 2,6 |
| Taps- og niðurskrivingarprosent í hálvárinum | -0,1 | 0,1 | 0,0 | 0,1 | 0,1 |
| Útlánsvøkstur í hálvárinum | 3,0 | 3,9 | 2,4 | 3,0 | 0,8 |
| Útlán í mun til eginpening | 7,9 | 8,2 | 8,0 | 8,1 | 8,4 |

| Høvuðstøl (1.000 DKK) | 1H 2019 | 1H 2018 | 1H 2017 | 1H 2016 | 1H 2015 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapartøl** | | | | | |
| **Inntøkur** | | | | | |
| Netto rentuinntøkur | 30.976 | 30.891 | 29.604 | 28.660 | 28.408 |
| Netto kostnaðarinntøkur | 5.467 | 4.464 | 3.712 | 3.742 | 4.838 |
| Virðisjavnan | 1.197 | -255 | 1.167 | 2.611 | -70 |
| Aðrar inntøkur | 15 | 634 | 430 | 716 | 861 |
| **Inntøkur íalt** | **37.655** | **35.734** | **34.913** | **35.729** | **34.037** |
| **Útreiðslur** | | | | | |
| Rakstrarútreiðslur o.a. | 31.328 | 30.169 | 26.568 | 25.640 | 26.029 |
| Av- og niðurskrivingar, skuldarar | -1.610 | 539 | 282 | 480 | 1.815 |
| **Útreiðslur íalt** | **29.718** | **30.708** | **26.850** | **26.120** | **27.844** |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **7.937** | **5.026** | **8.063** | **9.609** | **6.193** |
| Skattur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Úrslit** | **7.937** | **5.026** | **8.063** | **9.609** | **6.193** |
| **Fíggjarjavni** | | | | | |
| Útlán | 1.943.065 | 1.875.321 | 1.735.089 | 1.645.581 | 1.546.546 |
| Virðisbrøv | 519.426 | 463.831 | 524.199 | 476.645 | 221.954 |
| Innlán | 2.350.170 | 2.271.993 | 2.186.545 | 2.040.194 | 1.868.966 |
| Javni | 2.633.436 | 2.543.671 | 2.451.381 | 2.286.258 | 2.104.188 |
| Eginpeningur | 246.726 | 228.237 | 217.788 | 203.612 | 184.320 |
| Ábyrgdir | 85.616 | 73.494 | 59.313 | 69.507 | 52.760 |

# Notur

| Nota | | 1H 2019<br>1.000 DKK | 1H 2018<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | **Rentuinntøkur** | | |
| | Innistandandi í peningastovnum o.a. | -358 | -280 |
| | Útlán | 32.224 | 32.623 |
| | Lánsbrøv | 816 | 992 |
| | Rentusáttmálar | -228 | -240 |
| | **Rentuinntøkur tilsamans** | **32.453** | **33.094** |
| | | | |
| 2 | **Rentuútreiðslur** | | |
| | Innistandandi hjá peningastovnum | 0 | -2 |
| | Innlán | 451 | 1.179 |
| | Eftirstillað kapitalinnskot | 1.026 | 1.026 |
| | **Rentuútreiðslur tilsamans** | **1.477** | **2.203** |
| | | | |
| 3 | **Kostnaðar- og provisiónsinntøkur** | | |
| | Virðisbrøv og goymsla | 49 | 39 |
| | Gjaldstænastur | 1.248 | 1.269 |
| | Lánisakskostnaður | 1.694 | 1.659 |
| | Provisión av ábyrgdum | 841 | 683 |
| | Aðrar kostnaðar- og provisiónsinntøkur | 1.978 | 1.252 |
| | **Kostnaðar- og provisiónsinntøkur tilsamans** | **5.810** | **4.902** |
| | | | |
| 4 | **Virðisjavnan** | | |
| | Lánsbrøv | 744 | -1.197 |
| | Partabrøv | 339 | 371 |
| | Íløguognir | 0 | 425 |
| | Gjaldoyra | 114 | 146 |
| | **Virðisjavnan tilsamans** | **1.197** | **-255** |
| | | | |
| 5 | **Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting** | | |
| | Løn og samsýning til umboðsráð, nevnd og stjórn | | |
| | Stjórn | 1.119 | 1.089 |
| | Nevnd | 556 | 563 |
| | Umboðsráð | 87 | 74 |
| | **Tilsamans** | **1.762** | **1.726** |
| | | | |
| | **Starvsfólkaútreiðslur** | | |
| | Løn | 10.928 | 10.798 |
| | Eftirløn | 1.914 | 1.934 |
| | Útreiðslur til sosiala trygd | 2.210 | 1.933 |
| | **Tilsamans** | **15.052** | **14.665** |
| | | | |
| | Aðrar fyrisitingarútreiðslur | 13.519 | 10.300 |
| | | | |
| | **Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting tilsamans** | **30.332** | **26.691** |
| | | | |
| | Miðaltal av starvsfólkum, ársverk | 44,3 | 43,2 |

# Notur

| Nota | | 1H 2019<br>1.000 DKK | 1H 2018<br>1.000 DKK | 2018<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|---|
| 6 | **Niðurskrivingar upp á útlán v.m.** | | | |
| | **Niðurskrivingar upp á útlán v.m.** | | | |
| | **Stig 1:** | | | |
| | Niðurskrivingar upp á útlán við ársbyrjan | 2.876 | 0 | 0 |
| | Broyting í roknskaparhátti | 0 | 2.831 | 2.831 |
| | Niðurskrivað í árinum (netto) | -90 | 430 | 45 |
| | Niðurskrivingar ultimo | 2.786 | 3.262 | 2.876 |
| | **Stig 2:** | | | |
| | Niðurskrivingar upp á útlán við ársbyrjan | 2.790 | 0 | 0 |
| | Broyting í roknskaparhátti | 0 | 4.381 | 4.381 |
| | Niðurskrivað í árinum (netto) | -436 | -1.912 | -1.591 |
| | Niðurskrivingar ultimo | 2.354 | 2.469 | 2.790 |
| | **Stig 3:** | | | |
| | Niðurskrivingar upp á útlán við ársbyrjan | 33.126 | 0 | 0 |
| | Broyting í roknskaparhátti | 0 | 31.209 | 31.209 |
| | Niðurskrivað í árinum | 3.047 | 6.093 | 4.469 |
| | Afturførdar niðurskrivingar í árinum | -3.318 | -2.906 | |
| | Avskrivað, áður niðurskrivað | 0 | 0 | -2.552 |
| | Niðurskrivingar ultimo | 32.855 | 34.396 | 33.126 |
| | **Niðurskrivingar upp á útlán v.m. tilsamans** | **37.996** | **40.126** | **38.792** |
| | **Burturleggingar upp á ábyrgdir v.m.** | | | |
| | **Stig 1:** | | | |
| | Burturleggingar upp á ábyrgdir við ársbyrjan | 3 | 0 | 0 |
| | Broyting í roknskaparhátti | 0 | 27 | 27 |
| | Burturleggingar í árinum (netto) | -3 | -10 | -25 |
| | Burturleggingar ultimo | 0 | 17 | 3 |
| | **Stig 2:** | | | |
| | Burturleggingar upp á ábyrgdir við ársbyrjan | 0 | 0 | 0 |
| | Broyting í roknskaparhátti | 0 | 0 | 0 |
| | Burturleggingar í árinum (netto) | 0 | 0 | 0 |
| | Burturleggingar ultimo | 0 | 0 | 0 |
| | **Stig 3:** | | | |
| | Burturleggingar upp á ábyrgdir við ársbyrjan | 0 | 0 | 0 |
| | Broyting í roknskaparhátti | 0 | 0 | 0 |
| | Burturleggingar í árinum (netto) | 0 | 0 | 0 |
| | Avskrivað, áður burturlagt | 0 | 0 | 0 |
| | Burturleggingar ultimo | 0 | 0 | 0 |
| | **Burturleggingar upp á ábyrgdir v.m. tilsamans** | **0** | **17** | **3** |

# Notur

| Nota | | 1H 2019<br>1.000 DKK | 1H 2018<br>1.000 DKK | 2018<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|---|
| 6 | **Niðurskrivingar upp á útlán v.m. (framhald)** | | | |
| | **Niðurskrivingar upp á fíggjarstovnar v.m.** | | | |
| | **Stig 1:** | | | |
| | Niðurskrivingar upp á fíggjarstovnar v.m. við ársbyrjan | 104 | 0 | 0 |
| | Broyting í roknskaparhátti | 0 | 124 | 124 |
| | Niðurskrivað í árinum (netto) | -40 | -62 | -19 |
| | Niðurskrivingar ultimo | 64 | 62 | 104 |
| | **Stig 2:** | | | |
| | Niðurskrivingar upp á fíggjarstovnar v.m. við ársbyrjan | 0 | 0 | 0 |
| | Broyting í roknskaparhátti | 0 | 530 | 530 |
| | Niðurskrivað í árinum (netto) | 0 | -374 | -530 |
| | Niðurskrivingar ultimo | 0 | 156 | 0 |
| | **Stig 3:** | | | |
| | Niðurskrivingar upp á fíggjarstovnar v.m. við ársbyrjan | 0 | 0 | 0 |
| | Broyting í roknskaparhátti | 0 | 0 | 0 |
| | Niðurskrivað í árinum (netto) | 0 | 0 | 0 |
| | Avskrivað, áður niðurskrivað | 0 | 0 | 0 |
| | Niðurskrivingar ultimo | 0 | 0 | 0 |
| | **Niðurskrivingar upp á fíggjarstovnar v.m. tilsamans** | **64** | **218** | **104** |
| | **Niðurskrivingar og burturleggingar tilsamans** | **38.060** | **40.362** | **38.899** |
| | **Samanseting til rakstrarroknskapin** | | | |
| | Niðurskrivingar upp á útlán netto | -796 | 1.705 | 2.923 |
| | Burturleggingar upp á ábyrgdir netto | -3 | -10 | -25 |
| | Niðurskrivingar upp á fíggjarstovnar netto | -40 | -436 | -550 |
| | Staðfest tap í árinum, ið ikki áður eru niðurskrivaði | 19 | 107 | 608 |
| | Inngoldið til áður avskrivaði krøv | -128 | -90 | -140 |
| | Niðurskrivingar av yvirtiknum ognum | 300 | -43 | 172 |
| | Renta av niðurskrivingum | -962 | -695 | -1.643 |
| | **Niðurskrivingar og burturleggingar til rakstrarroknskapin tilsamans** | **-1.610** | **539** | **1.345** |
| 7 | **Lánsbrøv til dagsvirði** | | | |
| | Statslánsbrøv | 167.282 | 142.740 | 142.653 |
| | Realkredittlánsbrøv | 339.213 | 308.747 | 347.432 |
| | **Lánsbrøv til dagsvirði tilsamans** | **506.495** | **451.487** | **490.085** |
| 8 | **Aðrar skyldur uttan fyri javnan** | | | |
| | Fíggjarábyrgdir | 9.822 | 11.252 | 11.355 |
| | Tapsábyrgdir | 15.242 | 10.569 | 12.802 |
| | Aðrar skyldir | 60.552 | 51.673 | 59.648 |
| | **Aðrar skyldir uttan fyri javnan tilsamans** | **85.616** | **73.494** | **83.805** |

www.ns.fo